# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ



## Ternan-KÍF 3-0 (25-18, 26-24, 25-18):

# Ternan fleyg upp

Frøin var stór á teimum í Ternuni, tá sigurin og harvið eisini uppflytingin í Eik-liguna gjørdist veruleiki í gjárkvøldið

Myndir: Álvur Haraldsen

**Nýggja flogbóltsfelagið, Ternan, vann eisini seinna upp- og niðurflytingardystin ímóti KÍF, sum var á Toftum í gjárkvøldið, og tí er felagið í bestu kvinnudeildini næsta ár**



Hilmar Jan Hansen

Eftir at hava vunnið 3-1 á KÍF í fyrra dystinum fyri viku síðani, hevði Ternan gott útgangsstøði, nú seinni dysturin í gjárkvøldið skuldi spælast á heimavølli í nýggju skúlahøllini á Toftum. Og tað gjørdist til enn ein sigur, 3-0, so Ternan flytur tískil upp í Eik-liguna.

Kollfjarðarkvinnurnar, sum hava verið niðastar í Eik-liguni í allan vetur, royndu sítt besta ímóti Ternuni, sum vann kappingina í 1. deild, men hóast KÍF fekk nógv uppaftur av gólvinum, var slagstyrkin ikki tann sama sum hjá Ternuni, og tað var høvuðsmunurin á liðunum.

Ternan hevði gjøgnumgangandi meira bit í álopsspælinum og fleiri spælarar, ið kundu sláa ígjøgnum, umframt at eitt nú Katrin Olsen og Sóley Troleis við sínum royndum vóru við til at lyfta hinar á liðnum, ið ikki allar hava so drúgvar flogbóltsroyndir.

Hinvegin hevði KÍF hesa ferð Angeli Joensen við sum hevara, og tað sá út til at gera spælið hjá kollfjarðarkvinnum heldur tryggari og róligari. Sum so mangan í vetur, var tað serliga í verjuspælinum, at KÍF stóð seg væl, men heldur ikki hesa ferð var tað nóg mikið til at hóra undan.

### Tvey jøvn lið

Stutt kann sigast um dystin, at liðini fylgdust eina løtu, men at KÍF síðani fór framum og helt leiðsluna væl út um miðjuna á settinum. Tá fekk Ternan fótin fyri seg fór at svara aftur, og serliga gjørdist munur á, tá Inga Jacobsen servaði sjey stig á rað, so settið endaði 25-18 til heimaliðið.

Í øðrum setti var javnt allan vegin, men liðini skiftust um at fara tvey stig framum. Nógvar og harðar duellir vóru í hesum settinum, og Ternan vann ikki settið, fyrr enn Sóley Troleis við einum avgjørdum smasji endaði eina ta longstu duellina, so Ternan vann 26-24.

Aftur í triðja setti var munurin lítil at byrja við, men síðsti javnleikurin var 12-12, tí seinnu helvtina av settinum hevði Ternan munin og økti hann, til, Marjun Brockie at enda við einum servuessi kundi avgera til 25-18, ið staðfesti 3-0 sigurin.

Talan var ikki um best spælda dystin í vetur, men av tí at liðini eru so jøvn, livdi hann allan vegin frá byrjan til enda við góðum duellum og nógvum av tí, ið plagar at eyðkenna finalurnar, har vinnarin fær alt og taparin situr eftir við ongum. So fæst at síggja, um tað nú veruliga verður so galið, tá avtornar.

---

# Vit mugu ikki niður

Vónbrotið lýsti av ungu andlitunum á KÍF-liðnum, tá dysturin á Toftum í gjárkvøldið var liðugur og KÍF samanlagt hevði tapt báðar upp- og niðurflytingardystirnar ímóti nýggja felagnum har, Ternuni.

– Eg haldi, at tað er ræðuliga keðiligt, um



vit skulu flyta niður. Og eg haldi, at eg kann svara fyri okkum allar, at eingin av okkum tímir niður í 1. deild at spæla. Sjálvt um vit ikki hava vunnið nakað í ár, so hava vit veruliga kempað alt úr okkum í hvørjum dysti, segði Bára Johannesen, ið er ein av teimum yngstu á liðnum hjá KÍF.

– Vit hava gjørt alt fyri at klára hetta. Vit eru ungar, men hava veruliga uppiborið at verða verandi í Eik-liguni. Eg eri stolt av okkum, tí vit hava allar lært øgiliga nógv hetta kappingarárið, samstundis sum vit hava ment okkum so nógv, at tað er heilt ótrúligt.

Bára sigur, at nú vóna tær í KÍF, at besta kvinnudeildin verður víðkað upp í átta lið, so KÍF kann halda fram við at spæla krevjandi dystir og vera við millum tey bestu liðini.

– Tað hevði verið deiligt og gott fyri okkum, um vit kundu hildið fram í Eik-liguni, tí so kunnu vit læra okkum meira og hava ein kjans, heldur enn at skula kempa okkum aftur upp úr 1. deild. Og verða vit verandi í bestu deildini, fáa vit kanska tær aftur, sum nú spæla aðrastaðni. Tað vænti eg eisini, at vit fáa, sigur Bára Johannesen.

**hil**

# Tað kennist ordiliga gott

Katrin Olsen, sum hevur ein hin fremsta drívmegin aftan fyri Ternuna, var eitt stórt smíl eftir dystin í skúlahøllini á Toftum, sum er frálíkur heimavøllur hjá felagnum.

– Eg haldi, at tað var í lagi, at vit vunnu 3-0, tí í kvøld vóru vit omaná næstan alla tíðina. Tað var líka í fyrsta setti, at vit vóru eitt sindur ótryggar, men so koyrdu vit tað heim, segði hon, samstundis sum hon viðgekk, at tað var ein góð kensla at flyta upp, nú flogbóltur bara hevur verið spældur á Toftum í tvey ár í hesum umfarinum.

– Jú, tað kennist ordiliga gott. Men eitt sindur av fjáltri hevur eisini merkt tankarnar, tí eg havi spurt meg sjálva, um vit veruliga eru klár til hetta, um vit fíggjarliga megna tað og alt. Men eg haldi, at vit á vøllinum fingu víst, at tað nokk skal ganga. Vit hava nógvar ungar og nýggjar við, og tær spældu ótrúliga væl. Fleiri eru byrjaðar fyri tveimum árum síðani, men standa einki aftan fyri meg og Sóley Troleis, ið hava nógvar royndir.

Eisini fróddist Katrin Olsen um stuðulin, liðið fær frá áskoðarunum, ið vóru vælmannaðir í gjárkvøldið.

– Tað var stuttligt at síggja nógv fólk til dystin í kvøld, tí tað hjálpir altíð væl til, at fólk bakka upp. Eg haldi eisini, at tað merkist í bygdini, at fólk taka væl undir við Ternuni, tí allastaðni, eg komi í gerandisdegnum, hava fólk hug at tosa um flogbóltin og felagið. Tað kennist eitt sindur øðrvísi og betri, enn tá tú spælir fyri eitt lið á einum øðrum staði, sigur Katrin, sum í fleiri ár var á besta kvinnuliðnum hjá ÍF, men nú spælir í heimbygdini.

**hil**

